


*Jens Christian Eldevig og Heini á Marknagili á rúmligu goymsluni hjá Faroe Ship í Norðhavnini*

*Mynd: Dávur Winther*

# Grønlendskur fuglfirðingur í Klaksvík

Fyrst í sekstiárunum fór fuglfirðingurin Sigurðjón Eldevig til Grønlands at smíða. Hann hevur verið víða, og hevur smíðað næstan á hvørjum pynti á vestursíðuni – eisini í Thule, sum hann plagar at taka til. Sigurðjón giftist grønlendskari konu í 1967 og í 1968 fingu tey elsta sonin Jens Christian. Tá ið børnini vóru smá, fluttu tey aftur til Fuglafjarðar og búðu tey har, til Jens Christian var 21 ár.

Jens Christian gjørdi vart við seg í fótbólti og spældi m.a. við ÍF í 1. deild í 1988 og 89.

Jens Christian flutti aftur til Grønlands saman við familjuni, tá ið hann var 21 ára gamal og hevur gjørt nógv ymiskt fyrifallandi arbeiði í Sisimiut, sum er vinarbýur Klaksvíkar og eisini í Nuuk. Sigurðjón var við til at byggja Tekniska skúlan í Sisimiut og bleiv eisini lærari á skúlanum, har hann eisini hevur fyrisitið pørtum av undirvíringini.

Seinnu nógvu árini hevur Jens Christian verið leiðari á Blue Water Shipping í Sisimiut saman við yngra beiggja sínum John Eldevig.

Jens Christian Eldevig, sum er ein sáttligur og friðarligur maður og veit hvat hann vil, hevur rættiliga gjørt um seg við fótbólti i Grønlandi – Hann hevur verið á grønlendska landsliðnum í átta ár og spælt eini 60 landsdystir. Við B 67 í Nuuk hevur hann fimm ferðir verið grønlandsmeistari, ársins spælari 1999, útnevndur sum ársins fightari tvær ferðir og eisini verið ársins tekninari.

Síðani 2003 hevur hann verið venjari í mannsdeildini í Sisimiut.

Blue Waterhevur nú boðið Jens Chriastian eina leiðaraútbúgving innan shipping Í Ålborg. Í hesum sambandi steðgar hann á í Føroyum í eitt hálvt ár og leitar eftir einum arbeiði her nú hann er heima. Eisini stendur Jens Chriastian í boði at verða venjari hjá ÍF 2. deild, meðan hann er her.

Jens Christian hevur hugt seg eitt sindur um, nú hann er heima, og mikudagin gekk leiðin til Klaksvíkar at hitta Dávur Winther, mentanarleiðaran – sum kennast bæði úr Fuglafirði og frá vitjanum í Sisimiut í Grønlandi.

Skipað varð fyri einum rundtúri í Klaksvík at síggja ymisk virki og sjálvandi gekk leiðin fyrst norður í Norðhavnina at heilsa upp á Heina á Marknagili og síggja rúmliga goymslubygningin hjá Faroe Ship har. Eisini varð heilsað uppá Eyðun Rasmussen, stjóra á P/F Hvalnes, sum m.a. hevur sildaverksmiðjutrolaran Norðborg.

Jens Christian hevur búð 21 ár í Grønlandi og 21 ár í Føroyum og tosar føroysk sum ein fuglfirðingur. Hann var sera hugtikin av umstøðunum í Norðhavnini og ikki minst tí snotiliga húsinum, ið har stendur. Høvdu vit havt eina slíka havn í Sisimiut, so høvdu vit verið væl fyri, segði hann fegin um vitjanina í vinarbýnum hjá Sisimiut – Klaksvík.

Jens Christian spurdi um kava og kavagrevstur í Klaksvik, um hesum var meira av enn fyrr. Hann greiddi frá, at fyrstu ferð hann veit um, var tað regn í Sisimiut, tá ið jólatræið varð tendrað í 2010. So okkurt týður uppá, at veðurlagið er fyri broytingum.

- Ein hugnaligur dagur saman við einum hugnaligum manni var komin at enda. Men Jens Christian helt fyri, eg komi skjótt aftur, tí her er so nógv áhugavert í Klaksvík, eg vil vita meir um, sigur Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar kommunu.

## TØKK

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum vístu samkenslu og umsorgan, tá okkara góði pápi, verpápi, abbi, bróðir og besti vinur

**Einar Jacobsen**

doyði og fór til gravar.

Takk til Hera Joensen, prest, fyri troystarrík og góð orð í kapelli og kirkju. Takk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravarar.
Takk til tykkum øll, familju, vinir og grannar, sum hjálptu so væl til við ervinum, Takk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elsa**



## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri bróðir, svágur, mammubeiggi, ommubeiggi og gubbi

**Helgi F. Weihe**
**Tórshavn**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Hera Joensen, prest,
fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til berarar, sangarar,
kirkjutænarar og gravarar.
Takk til tykkum á Salong 55,
grannar, tit í Havnar Fimleikafelag
og skótarnar. Takk tit, sum bakaðu og til tykkum,
sum á ymiskan hátt hjálptu so væl til við
jarðarferðini og ervinum. Tøkk til tykkum, sum
ringdu, góvu blómur, krans, peningagávur til
Krabbameinsfelagið og tykkum mongu, sum fylgdu
honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Gott nýggjár øll somul!

*Familjunnar vegna*
**Sólrun og Hildigunn**